# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 15. november 2011, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Øssur Christiansen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Siri S. Niclassen boðað frá, at henni berst frá møta á fundinum vegna sjúku, og tiltakslimur fær fundarboð í hennaraa stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen hevur í telefonsamrøðu við kommunuskrivaran tann 15. november 2011 fingið fundarboð.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslimi.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 44**
2. viðgerð av uppskoti til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2011.
J.nr. 2009-321
Fíggjarnevndin mælir til at leggja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2011 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð, og at samtykkja uppskotið.

**Viðv. 44**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 45**
Framløga/1. viðgerð av fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2012
J.nr. 2009-392
Fíggjarnevndin samtykti at leggja uppskot til fíggjarætlan fyri 2012 fyri bygdarráðið til framløgu/1. viðgerð.

**Viðv. 45**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2012 varð lagt fram.

**Mál 46**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møguliga einskiljing av festihúsum á festinum matr. nr. 216a.
J.nr. 2009-406
Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 8. november 2011 skriv frá Búnaðarstovuni um møguliga einskiljing av festihúsum á festinum matr. nr. 216 a – festari er Heini á Heygum.
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 46**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 47**
Áheitan á bygdarráðið frá Hjartvard Kjærbæk um forkeypsrætt upp á tann partin av matr. nr. 11a, sum við ætlaðari marknaumskipan verður lagdur afturat litra "b", sum er vegmatrikkulin á Bakkanum.

**Viðv. 47**
Karl A. Olsen, borgarstjóri, skjeyt upp at lata forkeypsrættin fylgja tí partinum av matr. nr. 11a, sum sethúsini standa á.
Uppskotið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Øssur Christiansen